# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Medisinski Depilin:

## Fyrsta føroyska eftirútbúgvingin



Fyrsta føroyska eftirútbúgving á Medisinska Deplinum á Landssjúkrahúsið hevur verið.

Tað eru sjúkrarøktarfrøðingar á B8, sum hava tikið cardiologiska eftirútbúgving á Landssjúkrahúsinum. Útbúgvingin tók tilsamans 20 dagar. Fríggjadagin 6. mars fingu tær handað prógv í Veitsluhøllini.

Tær sum tóku prógv eru: Tórun Smith, Elin Winther Arge, Marjun Thomsen, Marita Mørk Johannesen, Katrin á Lakjuni, Sunneva Jacobsen, Maibritt Hansen, Bjørg Olsen, Sigga Gleðisheygg, Esmi Olsen, Hanna Johansen, Jacoba Thomsen, Jórun Syderbø, Anna Maria Mortensen og Annika Klein.

*Mynd: Landssjúkrahúsið*

## Nøvnini funnin til myndina



Herfyri høvdu vit hesa myndina í blaðnum, har vit bóðu lesarar siga okkum frá, um tey kendu fólkini á myndini.

Ein lesari í Sandavági, ið eisini er ein av spælarunum á myndini, ættað úr Hvalvík, hevur hjálpt okkum við nøvnunum á teimum ovaru gentunum, og ein lesari í Vestmanna hevur hjálpt okkum við teim niðaru gentunum.

Lesarin úr Sandavági heldur, at myndin er tikin í 1948 í Hvalvík. Sigast skal, at hondbóltsfelagið í Hvalvík tá æt Báran.

Hvalvíksgentur (standandi) f.v.: Helga Djurhuus, Signhild, Trina Jacobsen, Anna Højsted, Elly Egholm, Selma, og Erna

Vestmannagenturnar (sitandi) eru f.v.: Lisabeth Andreasen á Deild, Poula Klein, Ella Olsen (í Sjúrðastovu), Tyra Simonsen, Elsa hjá Hanseman á Deild, Gunnhild, ímillum har situr Olga, og uttast til høgru er tað Lis Thomsen. Maðurin, sum stendur til vinstru, er Kristoffer á Skálum, og hin maðurin er Sigurð Petur Joensen, lærari.

Um onkur hevur meira at leggja afturat í samband við hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at ringja á tel. 284444 ella senda teldupost til: birgir@sosialurin.fo.

†

### Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Jonu Joensen** verður úr Betesda mikudagin klokkan 13.30. Tey ið ynskja at minnast Jonu, kunnu lata eina gávu til Minnisgrunn hjá Jonu til frama fyri menningartarnaði børn og ung, konta í Føroya Banka

**Ellinor Udbø Jensen**, ættað úr Tórshavn, búsitandi í Ledøje, andaðist hósdagin, 83 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Gladsaxe kirkju fríggjadagin 13. mars klokkan 11.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Kaj Vilhelm Meyer**
Tvøroyri

andaðist týsdagin 10. mars, 84 ára gamal.
Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi, leygardagin kl. 18.00
Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju sunnudagin kl 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Herfríð, Vilhelm og Katrin**

Tey, ið vilja minnast Kaj, kunnu lata Hjartafelaginum eina peningagávu.

**Dagurin**
**11. mars. Thala.** Ókend ung genta, sum tíðliga í fornkirkjuni varð tikin av døgum fyri trúgv sína.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

